# Ársfrágreiðing 2006


Fororð 2
Javnstøðunevndin 3
Arbeiðssetningur 3
Nevndarlimirnir 3
Nevndarfundir og avgreiðsluskrivstovan 4

Samstarv við aðrar stovnar 5
Føroya landsstýri 5
Lógarbroytingar 5
Nevndir, ráð og líknandi 5
Yvirlit yvir nevndir, ráð og líknandi 5
Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki 6

Kunnandi virksemi 6
Tíðindaskriv 6
Í fjølmiðlunum 6
Útvarp Føroya 7
Sjónvarp Føroya 7
Bløðini 7
Onnur kunning 8

Heimasíða 8
Avgerðasavn 8

Gallup-kanningar 9

Eftirlit og undantaksloyvi 9
Nevndir og ráð (§ 8) 9
Visjón 2015-strategibólkarnir 9
Almennar nevndir og ráð sum heild 10

Undantaksloyvi 10
Sjálvstýrisbólkurin í Visjón 2015-verkætlanini 10
Arbeiðsbólkur fyri rehabiliteringsætlan fyri Føroyar 11

Tilmæli og ummæli 11
Tilmæli um lóg um foreldramyndugleika og samveru 11
Ummæli av løgtingsuppskoti um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan 11
Samstarv við aðrar tjóðir 11
Norðurlendsku javnstøðunevndirnar 11
Norðurlandaráðið 11

Altjóða javnstøðuarbeiði 11

Javnstøða 2007 12

Fylgiskjøl 13

# Fororð

Javnstøðulógin var løgd fram á ting sum uppskot fyri skjótt 15 árum síðani. Í almennu viðmerkingunum stendur, at enn er langt á mál, umvegis javnrætt til javnstøðu.

Sanniliga er langt eftir enn. Javnstøðunevndin merkir, at trupult er at halda sjálvt ta greiðastu ásetingina í lógini, um at kynini bæði skulu vera umleið líka væl umboðað í almennum nevndum, um ikki góðar grundir eru fyri undantaki.

Hinar ásetingarnar verða sjáldan brúktar, men neyvan tí fullkomin javnstøða er, uttan heldur tí málini ikki koma fram. Men kortini mugu vit vóna, at lógin hevur sína ávirkan á arbeiðsmarknaðinum sum ætlað.

Javnstøðunevndin hevur farna árið lagt seg eftir at skipa skrivstovuna betur við hálvum fakligum skrivara, nýggjari heimasíðu, regluligum nevndarfundum og átøkum í miðlunum. Ikki minst hevur nevndin lagt seg eftir samstarvi við Demokratia – nevndini fyri øktum kvinnuleikluti í politikki.

Í 2007 væntar nevndin at fáa avtalu í lag um skrivstovusamstarv og vónar at kunna taka fleiri mál til viðgerðar. Serliga er ætlanin at gera savnið hjá nevndini atkomiligt á netinum.

Við hesum verður ársfrágreiðingin fyri 2006 løgd fram.

# Javnstøðunevndin

Javnstøðunevndin er sjálvstøðugur stovnur skipaður undir Føroya Landsstýri, sambært kunngerð undir vinnumálaráðnum. Virkisøkið er lógarfest við løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn, og hvørs endamál er at beina burtur allan mismun vegna kyn.

Játtanin á fíggjarlógini 2006 var kr. 291.000. Nevndin veit ikki, hvussu hetta tal er komið í lag og hevur mælt til at hækka játtanina. Serliga eftir at Demokratia er liðug við sítt virksemi skuldi borið til at lagt játtanirnar saman og tryggja javnstøðunevndini umstøður at røkja skyldur sínar til fulnar.

## Arbeiðssetningur

Arbeiðssetningurin hjá nevndini er:

- at hava eftirlit við, at lógin um javnstøðu verður hildin, og at viðgera kærur frá fólkum, sum halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn, § 9 og § 11, stk. 1.
- at virka fyri at beina burtur allan mismun vegna kyn innan øll samfelagsøkir og luttaka í samfelagskjakinum við atliti til javnstøðuspurningar og veita upplýsing grundaða á ta vitan, nevndin í arbeiði sínum fær
- at virka fyri eins møguleikum til útbúgving, arbeiði, yrkisligari og mentanarligari menning, § 1
- at virka sum ráðgevi hjá almennum stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum og at samstarva við aðrar almennar stovnar, sum arbeiða við javnstøðumálum
- at geva tilmæli í javnstøðumálum, § 9
- at geva loyvi til frávik frá lógini viðvíkjandi starvslýsing o.ø., og viðvíkjandi setan av nevndum og ráðum, § 3 stk. 2 og § 8, stk. 2, umframt.
- at kunna um javnstøðulógina og –nevndina

## Nevndarlimirnir

Eftir lógini velur Føroya Landsstýri Javnstøðunevndia, seinast var tað landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, ið tilnevndi nevndina.

Føroya Landsstýri, nú avvarðandi landsstýrismaður, velur formannin og tilnevnir eftir tilmæli frá feløgum og stovnum fýra aðrar limir umboðandi:

- løntakarar
- arbeiðsgevarar
- Kvinnufelagasamskipan Føroya
- Skúla-, heilsu- og almannaverkið.

Javnstøðunevndin verður vald beint eftir løgtingsval og situr valskeiðið, ið løgtingið situr. Limir kunnu afturveljast.

Javnstøðunevndarlimir 2006 vóru:

Kári á Rógvi, PhD-lesandi, formaður.
Jákup Páll Mohr Mortensen, postboð, løntakarar.
Jan Mortensen, stjóri, arbeiðsgevarar.
Jancy Olsen, skrivstovukvinna, KSF.
Hanna Ziska Hansen, lærari, skúla-, heilsu- og almannaverkið.

## Nevndarfundir og avgreiðsluskrivstovan

Nevndarfundir hava verið annan hvønn mánaða í ymsum hølum í Tórshavn.

Fyrisitingarliga hevur formaðurin havt avgreiðsluna um hendi fram til 1. mars, tá Bjørg Jacobsen, etnologur, varð sett í starv sum skrivari hálva tíð. Skrivstovuarbeiðið hevur verið gjørt í privatari skrivstovu í húsi skrivarans, av tí at einki hóskandi skrivstovuhøli hevur verið til taks. Nevndin hevur arbeitt við at finna skrivstovuhøli, og væntandi verður hetta veruleiki fyrst í komandi ári.

# Samstarv við aðrar stovnar

## Føroya landsstýri

Javnstøðunevndin er ein sjálvstøðugur myndugleiki ásettur við lóg og skipaður undir Vinnumálaráðnum. Samstarvið við landsstýrið inniber m.a., at javnstøðunevndin, tá hon gerst varug við evni, sum landsstýrið eigur at taka til umhugsunar ella broyta, boðar landsstýrinum frá hesum. Tað kann vera tílíkt sum lógarbroytingar.

## Lógarbroytingar

Lóggáva okkara eigur ikki at vera orðað soleiðis, at serligar reglur eru galdandi fyri kvinnur ávv. menn. Lógir, har beinleiðis verður sagt, at kvinna og maður skulu viðgerast á hvør sín hátt, og lógir, sum bara raka annað kynið, ella raka kynini ymiskt, eru aloftast í stríði við javnstøðulógina. Undantikið tó, tá serligar grundgevingar eru, jbr. § 1 í lógini, sum heimilar, at tryggjast kann øðrum kyninum serlig rættindi, tá hesi ætlast at náa endamálinum í lógini.

Javnstøðunevndin hevur viðgjørt uppskot sum foreldramyndugleikalóg, marknaðarføringslóg og vallóg.

Nevndin hevur vent sær til Vinnumálaráðið, ið varðar av javnstøðu politiskt, um samstarv og um at fáa broytt lógina um barsilsskipan, so hon samsvarar við javnstøðulógina. Nevndin hevur vent sær til fíggjarnevndar um at tryggja størri játtan. Nevndin hevur eisini vent sær til innlendis- og vinnumálráðini um broytingar í vallógini.

## Nevndir, ráð og líknandi

Samb. § 8 í Javnstøðulógini skal kynsbýtið í øllum almennum nevndum, ráðum og líknandi vera javnt. Størsta samskiftið við landsstýrið snúði seg um § 8. Javnstøðunevndin gjørdist í mai varug við, at fleiri av strategibólkunum í Visjón 2015-ætlanini ikki luku treytirnar á leið javnt kynsbýti. Javnstøðunevndin gjørdi Løgmansskrivstovuna varuga við hetta og heitti á hesa um at gera neyðugu broytingarnar. Løgmansskrivstovan tók áheitanina til eftirtektar og broytti bólkarnar samsvarandi lógini.

## Yvirlit yvir nevndir, ráð og líknandi

Tað er skylda hjá Javnstøðunevndini at fylgja gongdini við kynsbýtinum í nevndum, ráðum og líknandi. Nevndin hevur vent sær til aðalráðini um at fáa útvegað yvirlit yvir hesi. Tað er ikki eydnast at fáa svar frá øllum aðalráðunum í 2006, men málið verður fylgt upp í 2007.

## Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki

Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki (sum hevur fingið heitið Demokratia) skal virka fyri at fáa fleiri kvinnur í politikk – fór til verka í 2006. Nevndin hevur 10 limir:

1 umboð úr hvørjum politiskum flokki (6 íalt)
1 umboð fyri Javnstøðunevndina
1 umboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya
1 umboð fyri Kommunusamskipan Føroya
1 umboð fyri Føroya Kommunufelag

Av ymsum orsøkum fór Demokratia ikki til verka fyrr enn á sumri 2006. Javnstøðunevndin og Demokratia hava síðan tá samstarvað við felags skrivara og heimasíðu. Haraftrat hava nevndirnar báðar samstarvað um ymisk átøk:

- 5. oktober: Uppskot um javnstøðu á tingi í 2-4 vikur (sí skjal)
- 4.november: Fyrilestur við íslendsku Hólmfríður Sveinsdóttir og føroyskum fyrilestrahaldarum. H. Sveinsdóttir hevur sitið í eini íslendskari nevnd fyri øktum kvinnuleikluti í politikki í 5 ár og greiddi frá royndum og úrslitum.
- 20. desember: Uppskot um broyting í vallógini (sí skjal)

# Kunnandi virksemi

Tørvur er á kunning um, hvat javnstøða og javnstøðuhugburður merkir. Eisini er tørvur á upplýsing um lógina, og um hvussu hon kann brúkast. Ein partur av arbeiðinum hevur verið at samskifta við fjølmiðlarnar.

## Tíðindaskriv

Nevndin hevur sent út fleiri tíðindaskriv og hildið tíðindafundir, millum skrivini eru:
- um tíðindafund um virksemið hjá Javnstøðunevndini, herundir Gallup-kanningin 2004 um arbeiðsbýti í føroysku húsarhaldunum (9. mai)
- viðmerkingar til nýggju foreldramyndugleikalógina (25. august)
- uppskot (saman við Demokratia) um javnstøðu á tingi í 2-4 vikur (5. oktober)

## Í fjølmiðlunum

Javnstøðunevndin og –lógin hevur verið nógv umrødd í fjølmiðlunum í ár, bæði í kringvarpinum og bløðunum. Somuleiðis hava umboð fyri Javnstøðunevndina úttalað seg í fjølmiðlunum fleiri ferðir:

## Útvarp Føroya

- samrøða við skrivaran um, at kvinnur sjáldan verða bidnar um viðmerkingar til fjølmiðlarnar (8.mars)
- samrøða við formannin og skrivaran um Gallup-kanning um arbeiðsbýtið í føroysku húsarhaldunum, sum Javnstøðunevndin hevur latið gjørt í 2004 (11. mai)
- samrøða við formannin um ógreiðu hølisviðurskiftini hjá Javnstøðunevndini (12. mai)
- samrøða við formannin, sum útdýpaði viðmerkingarnar frá Javnstøðunevndini til nýggja foreldramyndugleikalóg (25. august)
- uppskotið um javnstøðu á tingi (tíðindaskriv 5. okt.) umrøtt (7. oktober)
- uppskotið um javnstøðu á tingi umrøtt í kjaksendingini 62° Norður (13. oktober)
- samrøða við formannin um positiva diskriminatión (16. oktober)
- upptøkubrot frá tingfundi 25. oktober um uppskotið um javnstøðu á tingi (26. oktober)
- uppskotið um javnstøðu á tingi (27. oktober)
- uppskotið um javnstøðu á tingi umrøtt í kjaksendingini Bylgjan (2. november)
- viðmerkingarnar frá Javnstøðunevndini til uppskot hjá Tjóðveldisflokkinum um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan umrøddar (13. november)
- samrøða við skrivaran um javnstøðu í kjaksending (12. desember)
- javnstøðulógin og positiv diskriminatión í kaksending (15. desember)

## Sjónvarp Føroya

- samrøða við formannin um foreldramyndugleikalóg (19. september)

## Bløðini

Javnstøðunevndin er fleiri ferðir nevnd í bløðunum, m.a:

- frásøgn frá fundi á Háskúlanum (Sosialurin 8. mars)
- frásøgn frá 8. mars fundi í Sjónleikarhúsinum (Sosialurin 9. mars)
- grein um Gallup-kanning og virksemið hjá Javnstøðunevndini (Dimmalætting 11. mai)
- Javnstøðulógin gloymd í Visjón 2015 (Dimmalætting 11. mai)
- grein um Gallup-kanning og virksemið hjá Javnstøðunevndini (Sosialurin 15. mai)
- Landsstýrið rættar seg eftir Javnstøðunevndini í sambandi við Visjón 2015-bólkarnar (Dimmalætting 15. mai)
- viðmerkingar frá Javnstøðulógini um foreldramyndugleika (Dimmalætting 28. august)
- samrøða við skrivaran um ráðstevnu um harðskap móti kvinnum (Sosialurin 31. august)
- samrøða við formannin um tulking av tilráðing frá Útnorðurráðnum í sambandi við altjóða samstarv (Sosialurin 2. oktober)
- umrøða av uppskotinum um javnstøðu á tingi í 2-4 vikur (Portalurin 5. oktober)
- samrøða við formannin um kvinnuráðstevnu í Grønlandi (Sosialurin 12. oktober)

- umrøða av uppskotinum um javnstøðu á tingi í 2-4 vikur (Sosialurin 24. oktober)
- grein um reaktiónirnar hjá ymsum tingmonnum uppá uppskotið um javnstøðu á tingi í 2-4 vikur (Sosialurin 26-27. oktober)
- formaðurin um reaktiónirnar hjá ymsum tingmonnum uppá uppskotið um javnstøðu á tingi 2-4 vikur (Sosialurin 27. oktober)

## Onnur kunning

Umboð fyri nevndina hava hildið fyrilestrar og havt innlegg

- 2. mars á fundi á Háskúlanum um kvinnur og politikk
- 8. mars í Sjónleikarhúsinum
- 18. mai fyri kvinnufelagnum URD
- 23. august fyri umboðum úr LO Danmark
- 4. november á evnisdegi, sum Demokratia skipaði fyri

Tað kemur eisini fyri, at skúlanæmingar, lesandi o.o. spyrja seg fyri hjá Javnstøðunevndini í sambandi við uppgávur o.t.

# Heimasíða

Gamla heimasíðan er tikin niður og nýggj sett upp, og arbeitt hevur verið við at flyta tilfarið á tí gomlu yvir á ta nýggju. Heimasíðan (www.javnratt.fo) hevur verið regluliga dagførd síðan mai. Vitjunartalið hevur verið økjandi:

Vitjunartal/viku í miðal:

1. ársfj.: 27
2. ársfj.: 47
3. ársfj.: 30[1]
4. ársfj.: 42

## Avgerðasavn

Ætlanin er at byggja eitt avgerðasavn upp á heimasíðuni, har avgerðir hjá Javnstøðunevndini verða lagdar út so hvørt. Haraftrat verða avgerðir 10 ár aftur í tíðina lagdar í savnið. Savnið hevur eina leitiskipan, so skjótt og lætt er at finna tað, ein leitar eftir. Arbeiðið við savninum er byrjað og verður væntandi liðugt á vári 2007.

[1] Juli var feria.

# Gallup-kanningar

Í mai varð ein Gallup-kanning um arbeiðsbýtið millum kynini í føroysku heimunum, sum Javnstøðunevndin hevur latið gjørt, almannakunngjørd á tíðindafundi.

Javnstøðunevndin fær ikki nógvar kærur ella fyrispurningar um lógarbrot, so sum mismun vegna kyn í sambandi við starvssetan, lønarviðurskifti, barsil osfr. Kortini kemur meira enn so fyri oyra, at fólk fáa viðgerð, sum ikki er í samsvari við javnstøðulógina. Javnstøðunevndin hevur tí sett sær fyri at kanna, hvussu tilvitað fólk eru um javnstøðulógina og javnstøðu í heila tikið, og haraftrat hvønn hugburð tey hava til javnstøðu. Av praktiskum og fíggjarligum orsøkum hevur Javnstøðunevndin samstarvast við Demokratia, sum eisini hevur valt at kanna nakrar spurningar, og nevndirnar hava í felag samstarvast við Gallup um tiltakið. Ætlanin er at gera Gallup-kanningina tíðliga í 2007.

# Eftirlit og undantaksloyvi

## Nevndir og ráð (§ 8)

§ 8 fyriskrivar:

”Allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, skulu vera sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Sama er galdandi fyri tær nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum løgtingið og bý- og bygdaráðini útnevna, tá ið tey, ið útnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtings- ella bý/bygdaráðslimir.
Stk. 2. Tá ið serligar grundir eru fyri tí, kann javnstøðunevndin geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær.”

Tað er skylda hjá Javnstøðunevndini at fylgja við í gongdini av kynsbýtinum í nevndum, ráðum og líknandi.

## Visjón 2015-strategibólkarnir

Javnstøðunevndin gjørdist í mai varug við, at 13 av teimum 23 strategibólkunum í Visjón 2015-verkætlanini ikki luku treytirnar um kynsbýti sbrt. § 8. Løgmansskrivstovan hevði ikki frammanundan vent sær til Javnstøðunevndina um undantaksloyvi. Nevndin gjørdi Løgmansskrivstovuna í brævi frá 8. mai varuga við, at hetta var lógarbrot og heitti á Løgmansskrivstovuna um at rætta brotið.
Løgmansskrivstovan svaraði í brævi frá 16. august, at strategibólkarnir nú vóru mannaðir í samsvari við § 8. Undantikin var Sjálvstýrisbólkurin, sum var mannaður við floksformonnunum sum føddum limum, og biðið varð um undantaksloyvi fyri henda bólk, sí niðanfyri undir ”Undantaksloyvi”.

## Almennar nevndir og ráð sum heild

Javnstøðunevndin er varug við, at ikki allar almennar nevndir, ráð og líknandi í almennum ella partvíst almennum partarfeløgum, grunnum og tílíkum eru sett saman av uml. eins nógvum limum av báðum kynum, soleiðis sum § 8 fyriskrivar. Nevndin hevur skrivað til aðalráðini um at fáa útvegað yvirlit yvir hesi. Heldur striltið hevur gingið at fáa brúkiligt tilfar. Yvirlit er fingið frá stjórnarráðunum, men summi av teimum eru tíverri neyvan fullfíggjað. Niðurstøðan er, at – út frá omanfyrinevndu ikki fullfíggjaðu yvirlitum – sá kynsbýtið í nevndum, ráðum og líknandi undir teimum ymsu aðalráðunum soleiðis út seinast í 2006:

| | Menn | (+ eykalimir) | Kvinnur | (+ eykalimir) |
|---|---|---|---|---|
| Fiskimálaráðið | 52 | 35 | 5 | |
| Fíggjarmálaráðið | 33 | | 27 | |
| Almanna- og heilsuráðið | 33 | | 28 | |

Tal á upplýstum nevndum, ið eru í samsvari við § 8 í lógini:

| | |
|---|---|
| Fiskimálaráðið: | 1 av 10 |
| Fíggjarmálaráðið: | 11 av 14 |
| Almanna- og heilsuráðið: | 9 av 10 |

Við heimasíðu og avgerðasavni fer nevndin væntandi at skipað hetta eftirlitisarbeiðið betur, soleiðis at nevndin er varug við, nær almennar nevndir verða valdar og við regluliga at minna almennar myndugleikar á manngagondina í § 8, at antin skulu "umleið líka nógvir" limir vera av hvørjum kyni, ella skal søkjast um undantaksloyvi sambært væl greinaðum grundgevingum, ið javnstøðunevndin skal meta um og taka støðu til.

# Undantaksloyvi

Tvær umsóknir hava verið um undantaksloyvi sbrt. § 8, stk. 2:

## Sjálvstýrisbólkurin í Visjón 2015-verkætlanini

Í brævi frá 16. august søkti Løgmansskrivstovan um undantaksloyvi fyri Sjálvstýrisbólkin, sum er mannaður við 6 monnum, einum floksformanni úr hvørjum politiskum flokki. Umsóknin varð gingin á møti (sí skjal).

### Arbeiðsbólkur fyri rehabiliteringsætlan fyri Føroyar

Almanna- og heilsuráðið søkti 15. september um undantaksloyvi til ein arbeiðsbólk við 8 limum úr ymsum feløgum og stovnum, allir kvinnur. Umsóknin varð gingin á møti (sí skjal).

## Tilmæli og ummæli

### Tilmæli um lóg um foreldramyndugleika og samveru

Javnstøðunevndin gav í august tilmæli um at seta galdandi donsku lógina um foreldramyndugleika og samveru í gildi, av tí at galdandi lógin í Føroyum er óheppin og ikki dagførd (sí skjal).

### Ummæli av løgtingsuppskoti um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan

Javnstøðunevndin ummældi í november løgtingsuppskot um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan. Nevndin metti tað vera vert at umhugsa at umskipa barsilsskipanina sum ein óheftan grunn og mælti haraftrat til at leingja barsilstíðina, gera skipanina liðiligari, tryggja báðum foreldrum møguleika at vera heima hjá barninum og at prístalsviðgera hámarksútgjaldið á hvørjum ári (sí skjal).

## Samstarv við aðrar tjóðir

### Norðurlendsku javnstøðunevndirnar

Javnstøðunevndirnar/umboð í Íslandi, Føroyum, Grønlandi, Danmark, Svøríki, Finlandi og Noregi hittast einaferð um árið til umboðsfund at kunna seg um gongdina í javnstøðarbeiðinum, hvat serliga er frammi, og hvat stendur fyri framman, herundir broytingar í lógarverkinum. Í apríl í ár var fundurin í Akureyri í Íslandi, har formaðurin og skrivarin luttóku. Í mai næsta ár verður fundurin hildin í Føroyum, og Javnstøðunevndin er farin undir fyrireikingarnar.

### Norðurlandaráðið

Eisini er samstarv um javnstøðu í Norðurlandaráðnum, sum vit vónandi kunnu gerast virknari partur av.

## Altjóða javnstøðuarbeiði

Samband og samstarv við onnur lond um javnstøðuarbeiði er mennandi. Ymiskt er, hvussu langt ymisku londini eru komin ávegis á javnstøðuleið. Føroyar hava ikki sjálvstøðuga umboðan í ST, men gjørdust bundnar av ST-sáttmálanum frá 18. des. 1979 um avtøku av øllum kynsmismuni móti kvinnum (CEDAW – Convention of Elimination of Discrimination

Against Women), tá hesin varð staðfestur fyri Føroyar 21.mai 1983 og sostatt fólkarættarliga bindandi fyri Føroyar. Herumframt samtykti løgtingið 31. mars 1987 at seta sáttmálan í gildi fyri Føroyar.

Í august í ár var umboð fyri Vinnumálaráðið til próvtøku í ST í New York. Í próvdóminum fáa Føroyar átalu og áheitan um at bøta um serliga hesi viðurskifti:

- lágu kvinnuumboðanina í politikki
- lønarmunin millum menn og kvinnur
- lágu kvinnuumboðanina í akademiska umhvørvinum
- lágu kvinnuumboðanina í leiðandi størvum

Dómurin kann lesast á www.javnratt.fo.

Næsta próvtøka verður í 2008.

# Javnstøða 2007

Nevndin væntar at fáa nógv av skafti í 2007.

- Fleiri ítøkilig javnstøðumál verða væntandi viðgjørd.
- Skrivstovan verður vónandi skipað betur í skrivstovusamstarvi.
- Avgerðasavnið og onnur kunning verða væntadi munandi betri.
- Eftirlitið við almennum nevndum verður meira skipað.
- Saman við Demokratia verður helst nakað munandi gjørt fyri kvinnur í politikki.

# Fylgiskjøl

1. Tíðindaskriv um Kvinnur á ting
2. Uppskot um broytingar í vallógini
3. Játtan av umsókn um undantaksloyvi frá Løgmansskrivstovuni
4. Játtan av umsókn av undantaksloyvi frá Almanna- og heilsuráðnum
5. Tilmæli um lóg um foreldramyndugleika og samveru
6. Ummæli av uppskoti um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan

# TÍÐINDASKRIV

## *KVINNUR Á TING*

5. oktober 2006

**Evni: Javnstøðunevndin vil hava kvinnur á ting**

Javnstøðunevndin og nevndin, ið virkar fyri øktum kvinnuleikluti í politikki, mæla til sum skjótast at fáa javnstøðu á tingi í ávíst tíðarskeið. Tey mannfólk, ið sita á tingi, fáa alla umrøðuna og allar møguleikarnar at vísa sínar dygdir, tessvegna er ójavnstøðan á tingi sjálvforstyrkjandi, og tí eiga vit at byrja eina góða kringrás við kvinnum á tingi.

Bert tríggjar kvinnur eru valdur inn á ting, svarandi til færri enn 10 % og tískil ein tann slakasta kvinnuumboðanin í heiminum. Men tingskipanin loyvir tingfólki at lova varaumboðum sínum framat. Níggju kvinnur hava tikið sæti sum varafólk á tingi higartil hetta valskeiðið.

Umframt hesar níggju kvinnurnar eru seks aðrar, ið antin eru ovast ella næstovast á varafólkalistanum.

Javnstøðunevndin, ið virkar saman við nevndini fyri øktum kvinnuleikluti í politikki, heldur, at vit áttu at roynt at fingið javnstøðu í lag á tingi í t.d tvær ella fýra vikur, so Føroya fólk sær, at tað ber til hjá kvinnum at umboða veljaran á tingi og gera seg galdandi í øllum málum. Við teirri umrøðu, ið stendst av at hava veruliga javnstøðu í nakrar tingvikur, áttu allir politiskir flokkar saman við limum og valevnum sínum at megna at brúkt uppstillingina til løgtingsvalið komandi at fáa størri og sjónligari kvinnuliga uppstilling – og síðani hækka nevnda lutfall frá sløkum 10 % nærri teimum 50 % av tingsessunum.

Føroya løgting er fyrimynd hjá øllum Føroya fólki, og tí er sera umráðandi, at javnstøða byrjar á tingi, ovast í politisku og fyrisitingarligu skipanini.

Vinarliga

| | |
|---|---|
| Kári á Rógvi<br>formaður í javnstøðunevndini | Eyðgunn Samuelsen<br>forkvinna í nevndini fyri øktum kvinnuleikluti í politikki |

(Niðanfyri er nærri greitt frá tí tøkniliga.)

Javnstøða kann fáast á tingi við at brúka § 63, stk. 1 í tingskipanini. Niðanfyri nevndu flokkar boða samstundis frá, at løgtingsmaður ella fastur varalimur tekur seg úr sæti í avrátt tíðarskeið. Teir flokkar, ið lættliga kunnu gera hetta eru:

Fólkaflokkurin í Vágum (annar varalimur), Sambandsflokkurin í Vágum (triðji varalimur, ið hevur verið inni á tingi), Fólkaflokkurin í Suðurstreymi (fyrsti varalimur), Javnaðarflokkurin í Suðurstreymi tvey umboð (fyrsti og annar varalimur), Tjóðveldisflokkurin í Suðurstreymi (triðji varalimur, ið hevur verið inni á tingi), Miðflokkurin (triðji varalimur, ið hevur verið inni á tingi), Javnaðarflokkurin í Suðuroy (annar varalimur), Tjóðveldisflokkurin í Suðuroy (fyrsti varalimur), Tjóðveldisflokkurin í Sandoy (fyrsti varalimur), Fólkaflokkurin í Norðoyum (annar varalimur), Javnaðarflokkurin í Norðoyum (fyrsti varalimur), Tjóðveldisflokkurin í Norðoyum (annar varalimur), Miðflokkurin í Eysturoy (annar varalimur).

Hetta gevur afturat teimum trimum føstu kvinnunum á tingi 17 kvinnur, so sjálvt um onkrari berst frá, skuldi borið til at fingið støðuna 16-16 á Føroya løgtingi í tvær vikur. Á tann hátt kundu politisku flokkarnir víst, at javnstøða ber til og givið veljarum eins væl og valevnum íblástur til næsta val.

# Broytingar í vallógini

Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki og javnstøðunevndin mæla til at landsstýrismaðurin leggur fram soljóðandi tvinnanda uppskot til broyting í løgtingsvallógini.

Til tess at tryggja, at annað uppskotið kann vinna frama, tó at hitt verður felt, verður mælt til at leggja bæði uppskotini fram; hesi kunnu kortini sambært tingskipanini verða viðgjørd undir einum.

Uppskotini eru:

- at býta listaatkvøður eftir kyni
- at áseta javnstøðu á valevnislistum

**I. Listaatkvøður býttar eftir kyni.**

| Galdandi ásetingar | Broyttar ásetingar |
|---|---|
| § 30. Endaliga uppgerðin av valinum í valdøminum verður gjørd av viðkomandi løgtingsvalnevnd í seinasta lagi vikudagin aftaná valið á tí staði, har valnevndarformaðurin býr.<br>*Stk. 2.* Valnevndin ger nýggja teljing og meting av teimum á hvørjum einstøkum valstaði givnu atkvøðuseðlum eftir reglunum í § 28.<br>*Stk. 3.* Síðan ger nevndin upp fyri hvørt valstað sær, hvussu nógvar persónligar atkvøður hvørt valevni hevur fingið. Uppgerðin verður gjørd fyri hvønn flokk sær eftir hesum reglum:<br>a) Persónligar atkvøður: Hevur veljarin sett kross út fyri navninum á einum valevni og annars ikki givið seðlinum nakað eyðkenni, verður atkvøðan roknað sum givin fyri hesum valevni.<br>b) Listaatkvøður: Hevur veljarin sett kross út fyri floksnavninum ella út fyri nøvnunum á fleiri valevnum ella sett kross yvir allan floksteigin, ella sett krossin á slíkan hátt, at tað ikki við vissu sæst, hvørt av valevnum floksins veljarin hevur atkvøtt fyri, verður atkvøðan at rokna sum listaatkvøða.<br>*Stk. 4.* Valnevndin kann ikki havna atkvøður, av tí at hesar falla á persónar, hvørs valbæri er ivasamt, men skulu tílíkir spurningar um | § 30. Endaliga uppgerðin av valinum í valdøminum verður gjørd av viðkomandi løgtingsvalnevnd í seinasta lagi vikudagin aftaná valið á tí staði, har valnevndarformaðurin býr.<br>*Stk. 2.* Valnevndin ger nýggja teljing og meting av teimum á hvørjum einstøkum valstaði givnu atkvøðuseðlum eftir reglunum í § 28.<br>*Stk. 3.* Síðan ger nevndin upp fyri hvørt valstað sær, hvussu nógvar persónligar atkvøður hvørt valevni hevur fingið. Uppgerðin verður gjørd fyri hvønn flokk sær eftir hesum reglum:<br>a) Persónligar atkvøður: Hevur veljarin sett kross út fyri navninum á einum valevni og annars ikki givið seðlinum nakað eyðkenni, verður atkvøðan roknað sum givin fyri hesum valevni.<br>b) Listaatkvøður: Hevur veljarin sett kross út fyri floksnavninum ella út fyri nøvnunum á fleiri valevnum ella sett kross yvir allan floksteigin, ella sett krossin á slíkan hátt, at tað ikki við vissu sæst, hvørt av valevnum floksins veljarin hevur atkvøtt fyri, verður atkvøðan at rokna sum listaatkvøða.<br>***Stk. 4.* Valnevndin ger síðani upp tillagaða persónliga atkvøðutalið. Listaatkvøðurnar verða býttar eftir kyni; so at so nær sum** |

| | |
|---|---|
| neyðugt avgerast av løgtinginum. Nevndin ger síðan ta endaligu uppgerðina yvir úrslitið av atkvøðugreiðsluni í valdøminum. Úrslitið verður innført í valbókina og kunngjørt fyri teim hjástøddu. | **gjørligt annaðhvørt valevni eftir atkvøðutali verður av hvørjum kyni.**<br>*Stk. 5.* Valnevndin kann ikki havna atkvøður, av tí at hesar falla á persónar, hvørs valbæri er ivasamt, men skulu tílíkir spurningar um neyðugt avgerast av løgtinginum. Nevndin ger síðan ta endaligu uppgerðina yvir úrslitið av atkvøðugreiðsluni í valdøminum. Úrslitið verður innført í valbókina og kunngjørt fyri teim hjástøddu. |
| § 31. Uppgerðin av valinum verður gjørd soleiðis, at fyrst verður avgjørt, hvussu nógv valevni skulu verða vald fyri hvønn valevnislista. Samlaða atkvøðutalið fyri hvønn valevnislista verður at býta við 1, 2, 3 o.s.fr. til hvørt atkvøðutalið er býtt við tali eins stórum og talið av sessum, sum avvarðandi valevnislisti kann hugsast at fáa í mesta lagi. Hægsta býtingartalið, sum soleiðis kemur fram, gevur tí lista, sum fær tað í sín lut, rætt til lim nr. 1, næsthægsta býtingartalið gevur tí lista, sum fær tað í sín lut, rætt til lim nr. 2 o.s.fr., til talið á umdømisvaldum limum, ið valdir skulu verða, er býtt millum teir ymisku valevnislistarnar. Standa býtingartølini á jøvnum, skal lutakast fara fram. Lutakastið verður tikið av formanni valevndarinnar, meðan tey, ið hjástødd eru, síggja.<br>*Stk. 2.* Av hvørjum einstøkum lista verða teir valdu limirnir tiknir eftir persónliga atkvøðutali teirra. Standa atkvøður á jøvnum, ger lutakast av.<br>*Stk. 3.* Valnevndin gevur øllum teimum soleiðis valdu eitt valbræv.<br>*Stk. 4.* Í seinasta lagi 2 dagar aftaná at nevndin hevur gjørt upp býtið av limunum, skal valnevndarformaðurin senda landsstýrinum eina váttaða útskrift av tí, sum ført er í valbókina um valið.<br>*Stk. 5.* Atkvøðutilfarið verður goymt av valnevndarformanninum í 1 ár aftaná valið og skal síðani forkomast. | § 31. Uppgerðin av valinum verður gjørd soleiðis, at fyrst verður avgjørt, hvussu nógv valevni skulu verða vald fyri hvønn valevnislista. Samlaða atkvøðutalið fyri hvønn valevnislista verður at býta við 1, 2, 3 o.s.fr. til hvørt atkvøðutalið er býtt við tali eins stórum og talið av sessum, sum avvarðandi valevnislisti kann hugsast at fáa í mesta lagi. Hægsta býtingartalið, sum soleiðis kemur fram, gevur tí lista, sum fær tað í sín lut, rætt til lim nr. 1, næsthægsta býtingartalið gevur tí lista, sum fær tað í sín lut, rætt til lim nr. 2 o.s.fr., til talið á umdømisvaldum limum, ið valdir skulu verða, er býtt millum teir ymisku valevnislistarnar. Standa býtingartølini á jøvnum, skal lutakast fara fram. Lutakastið verður tikið av formanni valevndarinnar, meðan tey, ið hjástødd eru, síggja.<br>*Stk. 2.* Av hvørjum einstøkum lista verða teir valdu limirnir tiknir eftir **tillagaða** persónliga atkvøðutali teirra. Standa atkvøður á jøvnum, ger **kynsbýtið, í øðrum lagi** lutakast av.<br>*Stk. 3.* Valnevndin gevur øllum teimum soleiðis valdu eitt valbræv.<br>*Stk. 4.* Í seinasta lagi 2 dagar aftaná at nevndin hevur gjørt upp býtið av limunum, skal valnevndarformaðurin senda landsstýrinum eina váttaða útskrift av tí, sum ført er í valbókina um valið.<br>*Stk. 5.* Atkvøðutilfarið verður goymt av valnevndarformanninum í 1 ár aftaná valið og skal síðani forkomast. |

Formligt uppskot:

**Uppskot**
**um broyting í løgtingslóg nr. 49 frá 20.juli 1978 um val til Føroya Løgting**

§ 1. Gjørdar verða hesar broytingar:

1. Í § 30 verður stk.4 broytt til stk. 5, og verður sett inn soljóðandi nýtt stk. 4:
"*Stk. 4.* Valnevndin ger síðani upp tillagaða persónliga atkvøðutalið. Listaatkvøðurnar verða býttar eftir kyni; so at so nær sum gjørligt annaðhvørt valevni eftir atkvøðutali verður av hvørjum kyni."
2. Í § 31 verður stk. 2 orðað av nýggjum:
"*Stk. 2.* Av hvørjum einstøkum lista verða teir valdu limirnir tiknir eftir tillagaða persónliga atkvøðutali teirra. Standa atkvøður á jøvnum, ger kynsbýtið, í øðrum lagi lutakast av."

§ 2. Lógin kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

**Almennar viðmerkingar**

Løgtingið samtykti 20. oktober 2005, at:

> "Løgtingið tekur undir við, at landsstýrismaðurin setur eina nevnd at arbeiða fyri, at kvinnur fáa ein øktan leiklut í at taka politiskar avgerðir.
>
> Í nevndini verða: Eitt umboð fyri hvønn flokk á Løgtingi, eitt umboð fyri Føroya kommunufelag, eitt umboð fyri Kommunusamskipan Føroya, eitt umboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya og eitt umboð fyri Javnstøðunevndina. Varalimir verða valdir fyri allar limir."

Hetta var beinleiðis í samsvari við uppskot til samtyktar um tilráðingar frá Útnorðurráðnum í 1999, sum Løgtingið samtykti 18. november 1999.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur:

> "Endamálið við hesum uppskoti til samtyktar er at seta eina nevnd, sum skal skipa fyri tvørpolitiskum tiltøkum til tess at økja um talið á kvinnum á Løgtingi og í kommunustýrunum kring landið. Vónandi kann eitt úrslit av hesum arbeiði verða, at umboðanin á leið verður í samsvari við umboðanina í hinum Norðurlondunum, sum er væl hægri enn í Føroyum. Í Landstinginum eru uml. 33% konufólk, í Altinginum eru uml. 30% konufólk, og í Fólkatinginum eru uml. 39% konufólk."

Kynbýtið á Føroya Løgtingi er út av lagi vánaligt – bert tríggjar kvinnur eru av 32 tingumboðum, svarandi til færri enn 10%. Hetta hóast kallmenn bert fingu 71,1 %, kvinnur 16,1 %, og 12.8% ikki atkvøddu fyri nøkrum kyni, uttan heldur fyri listanum.

Samsvarandi viðmerkingini um, at “úrslit av hesum arbeiði skal verða, at umboðanin á leið verður í samsvari við umboðanina í hinum Norðurlondunum,” hevur hetta uppskotið til endmáls at býta listaatkvøðurnar eftir kyni, soleiðis at umboðanin á Føroya Løgtingi, bæði fasta umboðanin og umboðanin ígjøgnum varaumboð, verður javnari eftir kyni.

Eftir eldri vallóg komu listaatkvøðurnar teimum valevnum til góðar, sum flokkarnir høvdu raðfest. Eftir galdandi vallóg fáa tey, ið atkvøða fyri listanum onga ávirkan á, hvør verður valdur, hóast tey hava latið tað upp til flokk sín at skipa umboðanina. Eftir hesum uppskoti verður tað aftur so, at listaatkvøðurnar verða býttar, nú eftir kyni. Teir veljarar, ið framvegis velja at atkvøða fyri listanum vita nú, at atkvøða teirra verður nýtt til at gera valið betur umboðandi. Teir veljarar, ið heldur vilja velja persón av ávísum kyni kunnu framvegis gera tað við at atkvøða persónliga.

**Serligar viðmerkingar**

*Nýtt § 30, stk. 4*
Eftir hesi ásetingini skulu listaatkvøðurnar býtast eftir kyni so langt tær røkka. Eru tvey fremstu valevnini eftir atkvøðutali av sama kyni, fær fremsta valevni av hinum kyninum so nógvar atkvøður burturav listaatkvøðutalinum, sum krevjast at gerast næstfremst. Soleiðis verðu hildið fram til ongar listaatkvøður eru eftir at býta ella ongin at taka ímóti, so raðfylgjan í atkvøðutali mest møguligt verður annaðhvørt kallur og kona, mannfólk og konufólk.

*Broytt § 31, stk. 2*
Tá stendur á jøvnum skal fyrst takast eftir kyni so nevnda raðfylgja kemur í lag, bert í øðrum lagi skal lutakast vera.

**Dømi, uppgerð av valinum í Suðurstreymi 2004:**

*Valið 2004, raðfylgja, listaatkvøður óbýttar*

| **Listi** | **A** | **B** | **C** | **D** | **E** | **H** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Listin | 280 | 490 | 348 | 57 | 234 | 112 |
| Flestar | ♂ - 574 | ♀ - 645 | ♂ - 412 | ♀ - 211 | ♂ - 1421 | ♂ - 407 |
| Næstflestar | ♂ - 450 | ♂ - 551 | ♂ - 380 | ♂ - 77 | ♀ - 527 | ♂ - 52 |
| Triðjflestar | ♂ - 336 | ♂ - 398 | ♀ - 341 | ♀ - 50 | ♂ - 197 | ♀ - 51 |
| Fjórðflestar | ♀ - 152 | ♂ - 185 | ♀ - 308 | ♂ - 33 | ♂ - 197 | ♀ - 48 |

Vald vóru A:2 (umframt 1 fastan varalim fyri landsstýrismann) , B:2, C:2, D:0, E:3, H:1.

*Valið 2004, raðfylgja, listaatkvøðurnar býttar*

| **Listi** | **A** | **B** | **C** | **D** | **E** | **H** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Listin | | | | | | |
| Flestar | ♂ - 574 | ♀ - 645 | ♂ - 412 | ♀ - 211 | ♂ - 1421 | ♂ - 407 |
| Næstflestar | ♂ - 450 | ♂ - 551 | ♀ - 381 | ♂ - 77 | ♀ - 527 | ♀ - 53 |
| Triðjflestar | ♀ - 337 | ♀ - 399 | ♂ - 380 | ♀ - 50 | ♂ - 197 | ♂ - 52 |
| Fjórðflestar | ♂- 336 | ♂ - 398 | ♀ - 308 | ♂ - 33 | ♀ - 197 | ♀ - 48 |

Í døminum verður sama tingmannatal valt, men býtið innanhýsis á listunum verður broytt.

| Uppgerð | Kvinnur valdar | Kvinnur fast v. | Kvinnur íalt | 1. var. |
|---|---|---|---|---|
| *Galdandi uppgerð* | 2 | 0 | 2 | 2 |
| *Broytt uppgerð* | 3 | 1 | 4 | 3 |

Broytingin hevði verið, at heldur enn tvær kvinnur, vóru tríggjar valdar í Suðurstreymi (á lista B, C og E). Harumframt hevði ein verið fastur varalimur á tingi (á lista A) móti ongari í dag, umframt at tríggjar (á lista B, E, H) høvdu verið fyrsti varalimur heldur enn tvær í dag. Sostatt høvdu fýra kvinnur sitið fast á tingi fyri Suðurstreym, og tríggjar aðrar høvdu regluliga verið varaumboð.

Í døminum eru bert fýra ovastu valevnini sett upp, men eftir lógarbroytingini skulu listaatkvøðurnar býtast til antin ikki fleiri akvøður eru eftir at býta, ella ikki fleiri valevni eru at taka ímóti kynsbýttum listaatkvøðum.

*Í døminum sæst:*
Á Lista A eru listaatkkvøðurnar ikki nóg nógvar til at broyta raðfylgjuna ovast á listanum, so at tað verður annaðhvørt konufólk og mannfólk, men eru kortini nóg nógvar at flyta konufólk fram á triðja plássið; tær eru tó ikki nóg nógvar at flyta konufólk fram á fjórða plássið at fáa javnvág í.

Á Lista B eru listaatkkvøðurnar nóg nógvar at broyta raðfylgjuna; ikki fleiri konufólk vóru á listanum, so nakrar listaakvøður høvdu lopið av.

Á Lista C eru listaatkkvøðurnar nóg nógvar at broyta raðfylgjuna.

Á Lista D er raðfylgjan ovast á listanum "eftir bókini", men listin fekk ongan valdan. Óneyðugt var tí at býta listaatkvøður.

Á Lista E eru listaatkkvøðurnar nóg nógvar at broyta raðfylgjuna, men ásetingin í broytta § 31, stk. 2 kemur nú til sín rætt, trý mannfólk og – við býttum listaatkvøðum – eitt konufólk eru jøvn við 197 atkvøðum hvør; nú verður fyrst tikið eftir kyni, síðani eftir lutakasti.

Á Lista H eru listaatkkvøðurnar nóg nógvar at broyta raðfylgjuna.

## II. Javnstøða á valevnislista

| Galdandi ásetingar | Broyttar ásetingar |
|---|---|
| **§ 17.** Valið fer fram eftir listum, har ávísir persónar bjóða seg fram sum valevnir í einum valdømi.<br>*Stk. 2.* Ein valevnislisti má ikki hava fleiri valevni enn trý fleiri enn talið av løgtingsmonnum, tó ongantíð meiri enn tað dupulta, ið veljast skulu í valdøminum. Um henda treyt verður ikki hildin, skal listin verða lýstur ógildugur.<br>*Stk. 3.* Valevnini skulu vera so skilliga lýst við navni, starvi og bústaði, at ongin samanblanding við nakran annan valbæran persón kann standast av.<br>*Stk. 4.* Valevnislistarnir mugu vera formanninum í avvarðandi løgtingsvalnevnd í hendi í seinasta lagi kl. 18.00 3 vikur frammanundan valdegnum.<br>*Stk. 5.* Listin skal vera undirskrivaður av valevnunum og av í minsta lagi 10 og í mesta lagi 15 veljarum sum stillarum, og hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, starvi og bústaði. Valevnini og stillararnir kunnu eisini undirskriva á avrit av valevnislistanum. Eisini kunnu valevnini í staðin fyri við undirskrift, vátta sína uppstilling við brævi, fjarriti, telexi o.tl. Listin skal vera latin inn av einum stillara, og hesin hevur rætt til á einum avriti av valevnislistanum at fáa kvittan frá formanninum fyri, at listin er móttikin og nær.<br>*Stk. 6.* Ongin má stilla upp samstundis til val í ymsum valdømum ella sum valevni hjá meira enn einum flokki ella stilla upp uttanflokka og samstundis taka undir við einum flokki. Ger nakar ímóti hesum, verður valið, um tað fellur á hann, ógildugt.<br>*Stk. 7.* Ongin kann vera stillari fyri meira enn ein valevnislista. Hann, ið er stillari fyri fleiri listar, kann ikki roknast sum stillari hjá nøkrum lista.<br>*Stk. 8.* Um valevnislisti verður lýstur | **§ 17.** Valið fer fram eftir listum, har ávísir persónar bjóða seg fram sum valevnir í einum valdømi.<br>*Stk. 2.* Ein valevnislisti má ikki hava fleiri valevni enn trý fleiri enn talið av løgtingsmonnum, tó ongantíð meiri enn tað dupulta, ið veljast skulu í valdøminum. Um henda treyt verður ikki hildin, skal listin verða lýstur ógildugur.<br>***Stk. 3.* Eru á vallista valevni av øðrum kyni meira enn eitt fleiri enn av hinum, skal listin hava undantaksloyvi sambært § 8, stk. 2 í javnstøðulógini. Um henda treyt ikki verður hildin, skal listin verða lýstur ógildugur.**<br>*Stk. 4.* Valevnini skulu vera so skilliga lýst við navni, starvi og bústaði, at ongin samanblanding við nakran annan valbæran persón kann standast av.<br>*Stk. 5.* Valevnislistarnir mugu vera formanninum í avvarðandi løgtingsvalnevnd í hendi í seinasta lagi kl. 18.00 3 vikur frammanundan valdegnum.<br>*Stk. 6.* Listin skal vera undirskrivaður av valevnunum og av í minsta lagi 10 og í mesta lagi 15 veljarum sum stillarum, og hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, starvi og bústaði. Valevnini og stillararnir kunnu eisini undirskriva á avrit av valevnislistanum. Eisini kunnu valevnini í staðin fyri við undirskrift, vátta sína uppstilling við brævi, fjarriti, telexi o.tl. Listin skal vera latin inn av einum stillara, og hesin hevur rætt til á einum avriti av valevnislistanum at fáa kvittan frá formanninum fyri, at listin er móttikin og nær.<br>*Stk. 7.* Ongin má stilla upp samstundis til val í ymsum valdømum ella sum valevni hjá meira enn einum flokki ella stilla upp uttanflokka og samstundis taka undir við einum flokki. Ger nakar ímóti hesum, verður valið, um tað fellur á hann, ógildugt. |

| | |
|---|---|
| ógildugur, ella um valevni verður strikað av listanum, skal henda avgerð nevndarinnar, sum er endalig, verða skrivað í valbókina, og úrskrift úr henni um hetta skjótast møguligt og í øllum førum fyri valið, verða send tí stillara, sum listan hevur latið inn.<br>*Stk. 9.* Heldur nevndin, at ein rættstundis innlatin valevnislisti er so ófullfíggjaður, at neyðugt er at gera hann ógildugan, skal nevndin beinanvegin boða viðkomandi stillara frá hesum og geva honum høvi til innan 24 tímar at bøta um brekið. | *Stk. 8.* Ongin kann vera stillari fyri meira enn ein valevnislista. Hann, ið er stillari fyri fleiri listar, kann ikki roknast sum stillari hjá nøkrum lista.<br>*Stk. 9.* Um valevnislisti verður lýstur ógildugur, ella um valevni verður strikað av listanum, skal henda avgerð nevndarinnar, sum er endalig, verða skrivað í valbókina, og úrskrift úr henni um hetta skjótast møguligt og í øllum førum fyri valið, verða send tí stillara, sum listan hevur latið inn.<br>*Stk. 10.* Heldur nevndin, at ein rættstundis innlatin valevnislisti er so ófullfíggjaður, at neyðugt er at gera hann ógildugan, skal nevndin beinanvegin boða viðkomandi stillara frá hesum og geva honum høvi til innan 24 tímar at bøta um brekið. |

Formligt uppskot:

**Uppskot**
**um broyting í løgtingslóg nr. 49 frá 20.juli 1978 um val til Føroya Løgting**

§ 1. Gjørdar verða hesar broytingar:

3. Í § 17 verður stk.3 broytt til stk. 4 osfr., og verður sett inn soljóðandi nýtt stk. 3: "*Stk. 3.* Eru á vallista valevni av øðrum kyni meira enn eitt fleiri enn av hinum, skal listin hava undantaksloyvi sambært § 8, stk. 2 í javnstøðulógini. Um henda treyt ikki verður hildin, skal listin verða lýstur ógildugur."

§ 2. Lógin kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

**Almennar viðmerkingar**

Løgtingið samtykti 20. oktober 2005, at:

> "Løgtingið tekur undir við, at landsstýrismaðurin setur eina nevnd at arbeiða fyri, at kvinnur fáa ein øktan leiklut í at taka politiskar avgerðir.
>
> Í nevndini verða: Eitt umboð fyri hvønn flokk á Løgtingi, eitt umboð fyri Føroya kommunufelag, eitt umboð fyri Kommunusamskipan Føroya, eitt umboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya og eitt umboð fyri Javnstøðunevndina. Varalimir verða valdir fyri allar limir."

Hetta var beinleiðis í samsvari við uppskot til samtyktar um tilráðingar frá Útnorðurráðnum í 1999, sum Løgtingið samtykti 18. november 1999.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur:

> "Endamálið við hesum uppskoti til samtyktar er at seta eina nevnd, sum skal skipa fyri tvørpolitiskum tiltøkum til tess at økja um talið á kvinnum á Løgtingi og í kommunustýrunum kring landið. Vónandi kann eitt úrslit av hesum arbeiði verða, at umboðanin á leið verður í samsvari við umboðanina í hinum Norðurlondunum, sum er væl hægri enn í Føroyum. Í Landstinginum eru uml. 33% konufólk, í Altinginum eru uml. 30% konufólk, og í Fólkatinginum eru uml. 39% konufólk."

Kynbýtið á Føroya Løgtingi er út av lagi vánaligt – bert tríggjar kvinnur eru av 32 tingumboðum, svarandi til færri enn 10%. Hetta hóast kallmenn bert fingu 71,1 %, kvinnur 16,1 %, og 12,8 % ikki atkvøddu fyri nøkrum kyni, uttan heldur fyri listanum.

Samsvarandi viðmerkingini um, at "úrslit av hesum arbeiði skal verða, at umboðanin á leið verður í samsvari við umboðanina í hinum Norðurlondunum," hevur hetta uppskotið til endmáls at tryggja javna uppstilling eftir kyni, soleiðis at umboðanin á Føroya Løgtingi, bæði fasta umboðanin og umboðanin ígjøgnum varaumboð, verður javnari eftir kyni.

Uppskotið ber í sær, at valevnislistar koma undir somu reglu sum almennar nevndir, nevniliga, at nærum eins nógv valevni skulu vera av hvørjum kyni. Frávik frá hesum kunnu fyrst og fremst koma fyri, tá ólíkatal av valevnum er uppstillað, og so tá talan er um flokkar ella fylkingar, ið ikki hava limir av øðrum kyninum, ella har ongin persónur av øðrum kyninum býður seg fram.

**Serligar viðmerkingar**

*Nýtt § 17, stk. 3*

Ásetingin ger, at mannagongdin í javnstøðulógini § 8 skal brúkast til valevnislistar. Flokkur ella fylking, ið stilla upp, mugu tryggja sær nærum javna umboðan av báðum kynum, men kunnu tó fáa undantaksloyvi, um so er, at viðkomandi felagsskapur hevur gjørt nøktandi og viðkomandi roynd at fáa kynsjavnauppstilling í lag. Størri frávikið er frá sama tali (burtursæð frá ólíkatali) av hvørjum kyni, verri verður at fáa undantaksloyvi.

Hjá størru flokkunum og hjá smærri flokkum í sterku valdømum teirra kemur helst ikki uppá tal at geva frávik uttan í heilt serligum førum at loyva fráviki uppá eitt valevni (afturat ólíkatali).

Løgmansskrivstovan
Tinganes
100 Tórshavn

Tórshavn, 5. oktober 2006

**Viðv.: Umsókn um undantaksloyvi til Sjálvstýrisbólkin í Visjón 2015**

Takk fyri bræv dagfest 16. august 2006, har víst verður á, at Visjón 2015-strategibólkarnir eru broyttir, so kynsbýtið nú er í samsvari við javnstøðulógina. Javnstøðunevndin fegnast um hetta framstig.

Samstundis verður í brævinum biðið um undantaksloyvi til strategibólkin ”Sjálvstýrismál”. Løgmaður hevur boðið floksformonnunum at luttaka í hesum bólki, og av tí at hesir í løtuni allir eru kallmenn, er eingin møguleiki at tryggja javnstøðu í hesum bólki.

Javnstøðunevndin hevur á fundi 4. oktober viðgjørt umsóknina. Av tí at atlitini fyri limaskapi í Sjálvstýrisbólkinum eru so fastløst, hevur nevndin samtykt at ganga henni á møti.

Javnstøðunevndin vil tó ikki at binda komandi javnstøðunevndir til hesa avgerðina; tískil er hetta undantaksloyvi bert galdandi til nevndin verður vald av nýggjum eftir næsta løgtingsval.

Javnstøðunevndin fer við hesum tó at minna Løgmansskrivstovuna á at taka atlit til javnstøðu í framtíðini, bæði tá arbeiðsbólkar skulu setast og annars. Ovansta valdið eigur at ganga á odda at halda lógina og vísa, at tað ber til at broyta og menna hugsunarhátt á hesum øki. Í førum sum hesum ber til at velja víðari atlit, til dømis at manna bólkin við einum limi úr hvørji floksleiðslu, so tað stóð flokkunum frítt at velja av báðum kynum. Júst sjálvstýrismálið er leingi viðgjørt í grundlógarnevndini/stjórnarskipanarnevndini, har fleiri kvinnur hava verið og eru limir. Eisini er góður siður at biða um fleiri uppskot frá tilmælandi stovnum og feløgum, so til ber hjá viðkomandi at vísa á fólk av báðum kynum.

Vinarliga

Kári á Rógvi, formaður

Almanna- og heilsuráðið
Eirargarður
100 Tórshavn

Tórshavn, 5. oktober 2006

**Viðv.: Umsókn um undantaksloyvi til setan av arbeiðsbólki fyri rehabiliteringsætlan**

Almanna- og heilsuráðið hevur í telduposti 17. september 2006 søkt Javnstøðunevndina um undantaksloyvi, jbr. § 8, stk. 2, í javnstøðulógini, í sambandi við setan av arbeiðsbólki, sum skal gera eina rehabiliteringsætlan fyri Føroyar. Upplýst er, at AHR hevur heitt á átta stovnar og feløg um at velja hvør sítt umboð til arbeiðsbólkin. Av hesum hava sjey svarað og tilmælt hvør sína kvinnu. Víðari verður upplýst, at tað – undantikið kommunulæknafelagið - ikki tykist gjørligt at finna mannlig umboð fyri hinar stovnarnar/feløgini.

3. oktober boðaði AHR í telduposti frá, at av tí at skotbráðið hjá arbeiðsbólkinum er so stutt, og Javnstøðunevndin ikki hevði svarað enn, hevði AHR gjørt av at manna arbeiðsbólkin samsvarandi tilmælunum hjá stovnunum og feløgunum. Viðmerkjast skal, at hetta er brot á mannagongdina. Javnstøðunevndin er ikki ein savnaður stovnur í gerandisdegnum, men heldur regluliga fundir. Tískil er avmarkað, hvussu skjótt mál kunnu avgreiðast. Umsóknir o.a. eiga tí at verða sendar inn í góðari tíð.

Javnstøðunevndin fer tó ikki at nokta at geva undantaksloyvi í hesum føri, men hevur á fundi 4. oktober, grundað á, at arbeiðsbólkurin bara verður at sita í stutta tíð, samtykt at ganga umsóknini á møti.

Undirstrikast skal, at játtanin er grundað á konkret viðurskifti, og at undantaksloyvið tí bert er galdandi fyri samansetingina av bólkinum, soleiðis sum AHR hevur boðað frá. Hetta merkir at ein og hvør broyting, líkamikið um lutfallið millum kvinnur og menn ikki broytist, eigur at hava við sær nýggja umsókn um undantaksloyvi.

Samstundis fer Javnstøðunevndin at minna AHR á at taka atlit til javnstøðu í framtíðini. Hetta kann gerast á fleiri mátar. T.d. kundi AHR í skrivi gjørt stovnar, feløg osfr. vart við javnstøðuatlitini og biðið tey sent tvey tilmæli í staðin fyri eitt. Hugsanin við javnstøðulógini og javnstøðuøkinum

generelt er nettupp, at m.a. fyrisitingarvaldið gongur undan og vísir á, at tað ber til at bróta gamlan sið.

Javnstøðunevndin biður tí við hesum um innlit í, hvøri mannagongd AHR hevur fylgt í sambandi við setanina av áðurnevnda arbeiðsbólki.

Vinarliga

Javnstøðunevndin

Kári á Rógvi, formaður

Løgmansskrivstovan
Tinganes
100 Tórshavn
Att.: Rúni Joensen

25. august 2006

**Evni: 7202-006/05-11 NB At seta í gildi lóg um foreldramyndugleika og samveru**

Góði Rúni Joensen

Sambært skrivi tykkara frá 8. mars 2006 er ætlanin at seta nevndu lóg í gildi í Føroyum. Javnstøðunevndin hevur viðgjørt uppskotið á fundi í august, men fer at seta málið á skrá aftur í oktober.

Javnstøðunevndin hevur fyrr víst á, at galdandi lóg er óheppin og eigur at vera dagførd. Nevndin mælir tí til at seta í gildi galdandi donsku lógina, tí hon hevur tann bata við sær, at foreldur, ið ikki eru gift, kunnu avráða felags foreldramyndugleika, umframt at ásetingar verða um kunning og samveru, tá foreldrini fara hvørt til sítt.

Men nevndin mælir eisini til, at bólkur verður settur alt fyri eitt at viðgera, hvussu lógin kann smíðast, so hon verður so góð sum til ber og verður so væl egnað til føroysk viðurskifti sum til ber. Serliga er neyðugt at viðgera nærri, hvørjar reglur skulu galda fyri foreldur, ið ikki búgva saman og ikki semjast um foreldramyndugleika og samveru. Til dømis kundi áseting verið um, at foreldrini eisini sambært dómi kunnu hava felags foreldramyndugleikar eftir at samlívið er endað, um tað er best fyri barnið.

Tann mest hóskandi foreldramyndugleikalógin kann setast í gildi á ymsan hátt, men tað eigur ikki at forða fyri at fara undir at viðgera málið. Javnstøðunevndin mælir til at seta arbeiðsbólk at viðgera spurningar um foreldramyndugleika, samveru og barnarættindi sum skjótast.

Hvussu foreldramyndugleikalógin skal setast í gildi er bert spurningur um teknikk. Í donsku lógini er áseting um, at lógin kann setast í gildi í Føroyum við teimum broytingum, sum neyðugar eru eftir føroyskum viðurskiftum. Harafturat kemur, at løgtingið alt síðani tað var endurreist hevur kunna mælt fólkatinginum til at samtykt lógir fyri Føroyum, umframt at til ber at yvirtaka málsøkið. Tí er málið tíbetur spurningur um at antin at seta donsku lógina í gildi ella ikki. Vit kunnu og eiga at fáa ta foreldramyndugleikalóg, sum er best hóskandi.

Vinarliga

Kári á Rógvi, formaður